## Keflavík kjølhálað

Tað hilnaðist illa – heilt illa – tá ið føroyski landsliðsspælarin, Símun Samuelsen, og liðfelagar hansara í Keflavík í kvøld spældu á útivølli ímóti Fram. Heimaliðið vann 5-0!, eftir at støðan í hálvleikinum hevði verið 2-0. Málini í 1. hálvleiki vóru bæði skorað fyrsta korterið. Símun Samuelsen var á vøllinum allar 90 minuttirnar. Hann hevði onkrar skotroyndir, men tað eydnaðist hvørki honum ella nøkrum av liðfeløgunum at skora mál. Úrslit í gjárskvøldið: Breiðablik-Fylkir 1-0, Grindavík-Valur 3-1, Stjarnan-FH 1-4 og Fram-Keflavík 5-0. Støðan: FH 40 stig, KR 27 stig, Fylkir 26 stig, Keflavík 24 stig, Stjarnan 23 stig, Valur 20 stig, Fram og Breiðablik 18 stig, Grindavík 15 stig, ÍBV 14 stig, Fjölnir 12 stig og Þróttur 11 stig.



## Niclas Niclasen úttikin

Niclas Niclasen verður við í føroyska landsliðshópinum, sum mikudagin í komandi viku fær vitjan av Fraklandi. Verjuleikarin hevur fingið boðini fyrrapartin. Vagnur Mohr Mortensen gav í gjár avboð til dystin vegna skaða. Hann hevur drúgva skaða at dragast við í fótinum. Og 30 ára gamli Niclas Niclasen, sum ongantíð áður hevur verið í landsliðshópinum, skal loysa hann av.



Hans á Lag gekk undan fyri HB í dystinum ímóti KÍ í gjárkvøldið, har Páll Klettskarð og hinir á KÍ-liðnum ofraðu seg – men til fánýtis

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# HB trý stig í hondina

**Ein dómarafeilur var orsøk til, at HB vann 2-0 og ikki 1-0, tá oddaliðið í gjárkvøldið vitjaði KÍ, sum hinvegin ikki tók av í fyrra hálvleiki, tá kjansirnir vóru har**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

At KÍ mestsum altíð spælir yvir evni, tá mótstøðuliðið er HB, gekk sjón fyri søgn í Klaksvík í gjárkvøldið. Enntá løgdu teir bláu so nógv fyri, at HB ongantíð av álvara fekk víst nógvar av teimum dygdum, ið eyðkenna eitt oddalið. HB fekk snøgt sagt ikki frið til tað.

Samstundis má ásannast enn eina ferð, at KÍ sjáldan hevur eydnuna við sær, tá festligir karmar annars eru um ein dyst. Hesa ferð Summarfestivalurin, ið saman við bæði Norðoyastevnu og Sjómannadegi hevur roynst norðoyingum væl, men KÍ illa.

Langt var millum sjussarnar hjá HB, og tað var líka við, at talan kanska var um bara eina einastu kvalitetsroynd ímóti KÍ-málinum. Allíkavæl vann HB 2-0, uttan nakrantíð at vísa tað stóra.

### Ivadómar

Tey bæði málini hjá HB vóru einki at reypa av. Tað fyrra skoraði Andrew av Fløtum upp á brotsspark, tá beinini vórðu tikin undan Fróða Benjaminsen mitt í fyrra hálvleiki. Býtt og óneyðugt, men at tað kundi henda, stóðst fyrst og fremst av, at HB fekk eitt hornaspark, tá KÍ í veruleikanum átti málspark.

Og so var tað seinna málið fimm minuttir fyri tíð, ið veruliga hevði »Maradona-stíl« – men altso av tí keðiligara slagnum, ið neyvan hugaði nøkrum av teimum sera mongu áskoðarunum, ið vóru til dystin.

Ikki minni í tí førinum bar til at tosa um ein avgjørdan feil í dømingini, tá Hanus Thorleifsson fyrst boksaði bóltin – og sá út til at vænta, at dómarin fór at floyta fyri frísparki til KÍ. Síðani hælaði Hanus bóltin í málið – og sá kanska bilsnari út enn nakar annar, tá hetta var viðurkent sum mál!

### Tóku ikki av

Munurin, sum annars var á liðunum, var ikki stórur, men KÍ gjørdi klárt fleiri feilir enn HB, sum tóktist hava tamarhald á dystinum. Serliga var Hans á Lag ein brandur, ið veruliga vísti, hvussu virðismikil hann er fyri oddaliðið, tá mest umræður.

Kí kendi snøgt sagt ikki sína vitjunartíð, og tá Kristoffur Jacobsen, Heðin á Lakjuni, Hjalgrím Elttør og Páll Klettskarð ikki fingu gagnnýtt sínar størru og smærru kjansir, skal ikki altíð so nógv til, at tað í staðin endar við tapi – serliga ímóti einum betri liði.

KÍ, sum hevði sínar bestu løtur í fyrra hálvleiki og í sambandi við nakrar av deyðbóltsstøðunum í seinna, fekk hálvavegna reist seg aftur eftir smeitin við Margáir. Men framvegis sær liðið ikki betur út, enn stigatalvan sigur…

## FAKTA

**KÍ-HB 0-2 (0-1)**
0-1: Andrew av Fløtum, 19. (br.)
0-2: Hanus Thorleifsson, 85.
**Dómari**: Petur Reinert
**Hjálpardómarar**: Jan á Líðarenda & Jan Skoradal
**KÍ**: Jákup Mikkelsen – Jógvan Isaksen, Sørmund Kalsø, Jan Andreasen, Rudolf Eliasen – Heðin á Lakjuni (Atli Danielsen, 62.), John Hammer, Høgni Madsen (Niels Pauli Danielsen, 87.), Kristoffur Jacobsen (Steffan Kalsø, 72.), Hjalgrím Elttør – Páll Klettskarð
**HB**: Marcin David – Pætur Jørgensen, Hans á Lag, Rasmus Nolsøe, Poul Thomas Dam – Bjarni Jørgensen (Jógvan Rói Davidsen, 63.), Fróði Benjaminsen, Milan Kuljic, Páll Mohr Joensen (Kári Nielsen, 59.), Rógvi Poulsen – Andrew av Fløtum (Hanus Thorleifsson, 81.)
**Gult kort**: Rógvi Poulsen, Rasmus Nolsøe

## Ikki nøktandi

– Eg haldi, at í løtum høvdu vit bóltin nógv og royndu at trýsta teir eitt sindur, og tað var gott. Men at vit ikki fingu stig, var ikki nøktandi, tá vit eru í tí støðu, vit eru í, segði spælandi venjarin og málmaðurin hjá KÍ, Jákup Mikkelsen.

Tveir av spælarunum, KÍ hevur styrkt seg við, Atli Danielsen og Todi Jónsson, vóru ikki við frá byrjan. Atli hevur havt ilt í fótliðinum og vildi byrja uttanfyri, meðan Todi, sum annars var við í upphitingini undan dystinum, valdi ikki at vera við, tí hann enn hevði trupulleikar við lúskuni.

– Atli kom so inn í seinna hálvleiki, meðan Todi ikki var við hesa ferð. Honum fáa vit brúk fyri í komandi dystunum, staðfesti Jákup Mikkelsen.

*hil*

## Arbeiðssigur

Andrew av Fløtum, sum við brotssparki legði HB á odda í fyrra hálvleiki, var væl nøgdur við bæði úrslit og innsats ímóti KÍ, hóast tað kanska ikki sá út av so nógvum:

– Hetta var ein arbeiðssigur. Vit vistu, at tað fór ikki at vera nakar lættur dystur og at teir fóru at koma við øllum, tí KÍ hevði tapt 7-0 síðsta dyst. Tað bleiv heldur ongantíð vakurt spæl, ásannaði hann.

– Í fyrra hálvleiki fluttu vit spælið væl niðan á teirra hálvu, og teir spældu upp á sína styrki, sum er teir skjótu menninir. Í seinna hálvleiki spældu vit skilagott og løgdu okkum aftarlaga at bíða eftir teimum.